## Staturin tapti

Tað almenna noyðist at gjalda meginpartin av tí, sum tað kostaði at rudda eftir vanlukkuna, tá farmaskipið Rocknes sakk nærhendis Bergen í januar í 2004. Í tvey ár hava staturin og eigararnir ligið í stríði um, hvussu nógv hvør skuldi gjalda. Málið endaði heilt uppi í Hægstarætti, sum nú hevur gjørt av, at tað almenna skal rinda meginpartin. Ruddingin kostaði 127 mió. norskar krónur, og tað almenna skal rinda tær 90, sigur rætturin.

## Liggja á pengunum

Tann 14. desember staðfesti Eystari landsrættur, at grønlendska heimasýrið skal rinda einum fyrrverandi skrivstovustjóra tað, sum svarar til løn í trý ár. Talan er um meiri enn eina mió. krónur, men enn hevur maðurin ikki fingið eina krónu frá heimastýrinum. Harafturímóti hevur heimastýrið goldið sakarmálskostnaðin. Sakførarin hjá fyrrverandi skrivstovustjóranum heldur tað vera køgið, at heimastýrið ikki virðir úrskurðin hjá landsrættinum.

Fiskiveiðiavtalan millum Føroyar og Ísland:

# Sjáldan hava so nógvir trumfir givið so fá stikk

**- Hvørja ferð, vit samráðast við íslendingar, hoyra vit, at føroyingar hava eina botnfiskakvotu, sum vit einki gjalda fyri. Hetta leggur gift fyri eina og hvørja roynd at koma víðari. Vit kunnu ikki liva við at verða settir skák og mát hvørt ár av hesi botnfiskakvotu, og tí mugu vit taka hetta upp við íslendingar, áðrenn vit fara at samráðast aftur, heldur Atli Hansen**

FISKIVEIÐIAVTALA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í grein í Sosialinum í dag, sigur Atli Hansen, fyrrverandi nótaskipareiðari og formaður í felagnum Nótaskipum, at Føroyar ongantíð áður hava verið so væl fyri at seta krøv við nakrar samráðingar, sum hesaferð, nú vit samráddust um sínamillum fiskiveiðiavtaluna við Ísland.

- Vit høvdu nógvar og stórar trumfir, men eingin er spældur út. Tosað verður um frambrot við lodnuni, men hetta er neyvan so og hevur lítið og einki upp á seg.

Atli heldur, at íslendingar hava diskriminerað føroyingar við ikki at geva okkara skipum somu rættindir sum sínum egnu til at veiða og viðgera lodnu.

- Tað manglaði bara, at vit ikki skuldu fáa hesi rættindini, sum vit enn bert hava fingið ein lítlan part av. Tað er langt á mál, áðrenn hetta er komið í pottin, leggur hann aftrat.



*- Stór ójavnvág hevur verið í svartkjaftafiskiskapinum millum Føroyar og Ísland seinastu trý árini. Fara vit 10 ár aftur í tíðina, er bert eitt ár, har Ísland hevur veitt minni á føroyskum øki enn vit í íslendskum øki, sigur Atli Hansen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Stór virðir

Í greinini heldur Atli, at tey stóru virðini í sáttmálanum verða illa nokk tikin uppá tunguna, og í hesum sambandi nevnir hann atgongdina hjá íslendingum at veiða svartkjaft og sild í okkara øki.

- Jú, teir hava avmarkað talið av skipum til í mesta lagi at vera 12 í senn, men her er eingin avmarking, tí neyvan nakrantíð hava 12 íslendsk svartkjaftaskip verið í føroyskum øki samstundis.

Atli vísir á, at í øllum sínámillum fiskivinnusamráðingum verður í dag miðjað eftir at fáa "balanseraðar sáttmálar", sum hava nøkulunda sama virði fyri báðar partar.

- Hetta verður gjørt upp í toskavirði, sum soleiðis – um man kann siga – er gjaldoyrakursurin, tá ið samráðst verður.



*- Neyðugt verður at loysa málið um føroysku botnfiskakvotuna undir Íslandi fyri seg, áðrenn samráðingar verða aftur millum Føroyar og Ísland*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Botnfiskakvotan

Í greinini vísir Atli eisini á, at hvørja ferð, vit samráðast við íslendingar, hoyra vit – bæði frá okkara egnu og íslendingum, at føroyingar hava eina botnfiskakvotu, sum vit einki hava givið fyri.

- Hetta leggur gift fyri eina og hvørja roynd at koma víðari. Men vit kunnu ikki liva við at verða settir skák og mát hvørt ár av hesi botnfiskakvotu, og tí mugu vit taka hetta upp við íslendingar, áðrenn vit fara at samráðast aftur.

Atli heldur, at neyðugt verður at loysa málið um botnfiskakvotuna fyri seg við at gjalda tað, sum kvotan kostar, og her skjýtir hann upp, at vit kunnu lata íslendingum eitt mótvirði í atgongd til at fiska svartkjaft í føroyskum øki

### Stór ójavnvág

- Tá ið samráðingarnar um svartkjaftin byrjaðu, avráddu Føroyar og Ísland at fiska frítt inni hjá hvørjum øðrum, til kvota varð sett á. Tá var so nógvur svartkjaftur til, at vit eisini fingu svartkjaft í íslendskum sjógvi, men soleiðis er ikki longur. Nú er alt "normalt" aftur.

Í greinini vísir Atli Hansen eisini á ójavnvágina, sum hann heldur hevur verið í svartkjaftafiskiskapinum millum Føroyar og Ísland seinastu trý árini.

- Fara vit 10 ár aftur í tíðina, er bert eitt ár, har Ísland hevur veitt minni á føroyskum øki enn vit í íslendskum øki, sigur hann.

Í stuttum heldur hann, at íslendingar eiga at gjalda meira í toskavirði fyri tað, teir veiða av svartkjafti og norðhavssild í føroyskum sjógvi.

### Eitt neyðaregg

- Samanum tikið má júst undirskrivaði fiskivinnusáttmálin við Ísland sigast at vera eitt stórt – ella kanska rættari – lítið neyðaregg, sum hevur ómetaliga stórar samfelagsbúskaparligar avleiðingar.

Atli Hansen leggur aftrat, at teir størstu trumfirnir oftast geva tey flestu og bestu stikkini.

- Sjáldan munnu so nógvir stórir trumfir hava givið so fá stikk – fyri ikki at siga einki stikk. Teir vóru ongantíð spældir út, leggur fyrrverandi formaðurin í Nótaskipum aftrat.

Lesarabrævið hjá Atla er prentað í Sosialinum í dag.

# Missa ikki av kvotuni við at landa til matna

FISKIVEIÐIAVTALA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyar og Ísland samdust í síðstu viku um nýggjan fiskiveiðisáttmála fyri 2007.

Í nýggju avtaluni sleppa føroysk skip í ein ávísan mun at virka íslendska lodnu umborð – og/ ella landa hana til matna í Føroyum.

Semjan millum londini sigur, at skipini kunnu frysta 2/3 av lodnuni, tey veiða fyri 15. februar næsta ár og 1/3 eftir hálvan februar.

Meðan fiskiveiðiavtalan annars gongur frá 1. januar til 1. januar, gongur lodnuárið frá 1. apríl til 1. apríl.

- Enn vita vit ikki við vissu, hvussu stór heildarkvotan av lodnu í íslendskum sjógvi verður komandi lodnuár, men í avtaluni eiga vit 5% av heildarkvotuni upp til 500.000 tons, og verður kvotan 500.000 tons ella størri, eiga vit 30.000 tons av lodnu.

Bjørn Kalsø sigur, at tað eru íslendskir fiskifrøðingar, sum mæla til ásetingarnar av lodnukvotuni, og higartil í ár hava føroyingar fingið stívliga 18.000 tons í sín part.

Landsstýrismaðurin vísir á, at í fjør fingu føroyingar beinanvegin loyvi at veiða sløk 30.000.

- Tá ið lodnustovnurin hevur verið væl fyri, hevur kvotan verið ásett í einum, men soleiðis er ikki, tá ið ivi er um stovnin.

Landsstýrismaðurin vísir á, at endamálið hjá føroyingum er sjálvandi, at øll lodnan, sum føroysk skip sleppa at veiða í íslendskum sjógvi, skal kunna landast til matna ella virkast umborð.

- Men við avtaluni hesaferð er so prinsippið, sum íslendingar hava havt, brotið, og við hesum er gongd í hesum máli.

Bjørn Kalsø vísir á, at tað annars er upp til føroysk skip og virkir, hvat tey gera við lodnuna.

- Men endamálið má vera, at vit fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, sum er okkara – ella verður tillutað okkum í avtalu við onnur lond.

Um dagarnar hevur verið róð uppundir, at føroyska lodnukvotan undir Íslandi minkar við virðinum av tí fiski, sum landaður verður til matna.

- Men hetta er ikki rætt.

Hann vísir á, at føroyska lodnukvotan ikki verður ávirkað av, antin fiskurin verður landaður til íðnað – ella virkaður til matna.

- Okkara lodnukvota verður ikki ávirkað av hesum, leggur landsstýrismaðurin aftrat.